# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 9**



Erling og Jógvan eru á veg til hús, men beint áðrenn teir skiljast, steðgar Erling á.

-Tú mást orsaka at eg kom at missa hamaran í høvdið á tær. Tað var ikki við vilja!

- Hvat skal eg siga Erling? Eg havi rættuliga ilt í høvdinum, men av tí at tað er jólaaftan í morgin, so eri eg til reiðar at gloyma alt um hasa hendingina.

- Tað var deiligt Jógvan - so sigi eg bara góða nátt.

- Góða nátt Erling, vit síggjast í morgin.

Erling er so glaður fyri, at Jógvan hevur fyrigivið honum, at hann fer hoppandi eftir vegnum til hús.

Meðan fólkini í Hvannadali fara til songar, fer tað aftur at kava. Flykrurnar dala niður yvir bygdina, og øll fótafet sum fyri lítlari løtu síðani vóru um alla bygdina hvørva so við og við. Flykrurnar dala eisini á tað stóra jólatræið, og tað gongur ikki long tíð, so eru allar greinarnar hvítar. Millum allar flykrurnar sum dala frá himli, lúrir mánin. Onkuntíð er so tjúkt av flykrum fyri, at hann ikki sást, men lítla løtu seinni er hann bæði stórur og blankur. So við og við slókna ljósini í øllum gluggunum í bygdini og tá ein løta er farin, sova øll fólkini í Hvannadali....

....segði eg øll? Tað er ikki rætt, tí út úr skúrinum, har Leikamafian heldur til, koma tveir stórir bandittar. Tað eru Stampi og Anthonio. Í nátt fara teir á ránsmannaveiðu. Teir sníkja seg varisliga oman móti bygdini og fara inn í eitt hús fyri og annað eftir. Onkuntíð fara teir gjøgnum úthurðina, sum fólk við vilja ikki hava last, meðan aðrastaðni hava fólkini latið eitt vindeyga staðið á glopp.

Ístaðin fyri at leggja gávur undir jólatrøini, so taka teir allar gávurnar. Stampi og Anthonio hugna sær óført. At stjala leikur og gávur frá børnum er tað besta, teimum dámar. Soleiðis halda á teir á fram, hús fyri hús, og áðrenn tað aftur fer at lýsa, so hava teir stolið hvørja tí einastu gávu í bygdini.

Í tí teir skulu fara niðan frá bygdini, steðgar Stampi á.

- Nú kemur tað besta, sigur hann. Nú taka vit og leggja eina gávu í kavan her, eina her og eina har. Ja heilt niðan til húsini hjá Trølla Ommuni. Tá løgreglan í morgin fer at kanna, hvør tað er sum hevur stolið pakkarnar, so ganga teir bara eftir gávunum, sum føra beint til húsini hjá Trølla Ommuni.

- So fær Trølla Omman skyldina, ha ha ha ha ha ha.

*Puntur 13 til jólakalendaran*




